## Sjúkrahúsverkið 2007:



Sosialurin fór mikudagin undir eina greinarrøð í trimum pørtum, har Jákup Petersen, yvirlækni, hevur eina bersøgna gjøgnumgongd av støðuni í føroyska sjúkrahúsverkinum.

Í blaðnum mikudagin umrøddi hann støðuna ímillum tey trý sjúkrahúsini og hann nam við, hvussu leiðslubygnaðurin á Landssjúkrahúsinum er ein forðing fyri at menna sjúkrahúsverkið.

Í øðrum parti, sum varð prentaður í gjár, vísir hann á, at játtanin til sjúkrahúsverkið er økt einar 100 milliónir, uttan at nakað er fingið burturúr av týdningi. Og í triðja parti, sum vit prenta niðanfyri, vísir hann á, at ein broytt játtanarskipan kundi ført til kapping, so at brúkarin fær betri tænastu fyri lægri prís.

# So leingi sum gingið verður



**Seinastu tíðina hevur lítið gjøgnumskygni verið í øktu játtanini til sjúkrahúsini. Vit hava ikki sæð ætlanir, dygd, kostnaðarmetingar, býti millum stovnar. Hinvegin so hava vit sæð økta játtan uttan heildarmeting. Vit hava sæð hvussu somu viðgerðir, sum nú fara fram á tveimum sjúkrahúsum, við politiskari hjálp verður spjaddar til øll trý sjúkrahúsini**

*Jákup Petersen, yvirlækni*

### 3. partur

**Politikarar sum reka sjúkrahúsverk verða lagdir undir press fyri at styðja lokalpolitisk endamál..**

Landsstýrismaðurin talar skilagott um at .. "tað merkir, at vit samla eina viðgerð á einum staði" og at .. "vit eru so fáment, at vit mugu fáa sum mest burturúr hvørjari krónu".

Hinvegin so hevur seinastu tíðina verið lítið gjøgnumskygni viðvíkjandi øktu játtanini til verkið. Vit hava ikki sæð ætlanir, dygd, kostnaðarmetingar, býti millum stovnar o.t. Hinvegin so hava vit sæð økta játtan uttan heildarmeting. Vit hava sæð hvussu somu viðgerðir, sum nú fara fram á tveimum sjúkrahúsum, við politiskari hjálp verður spjaddar til øll trí sjúkrahúsini.

Hetta er sjálvandi politikkur og ikki fakligar metingar og vísir enn einaferð at politikarar ikki skulu reka sjúkrahús.

**Nýggjar nevndir og sama gongulag.**

Á sama hátt sum fyri 20 árum síðani, sita nevndir undir landsstýrismanninum og kanna, hvussu sjúkrahúsverkið kann rekast so skilagott sum gjørligt. Og eins og áður eru visiónirnar merktar av fakligari nihilismu.

Ávísir munir daga tó av og á fram úr mjørkanum. Millum annað so verða samráðingarnar nú leiddar av fólki, sum hava verið ímóti politiska viljanum um at hava trý sjúkrahús í Føroyum. Hetta gevur jú ikki bestu fortreytirnar fyri álit millum partarnar.

So leingi sum gingið verður á hesum gøtum fæst onga in framburður. Hvørki politiskt ella fakligt verður nøkur semja gjørd, sum kann stimbra og menna verkið. Reglur kunna verða gjørdar við duldum ætlanum, men endin er sum oftast, at funnir verða vegir uttanum meiningsleysar reglur, og so má alt málið uppá borðið aftur.

Eg vildi meint, at tað er ein av okkara grundarreglum at fylgja lógini sum sigur, at. tað eru trý sjúkrahús í Føroyum.

Spurningurin er so hvat eitt sjúkrahús er.

**Og hvat er eitt sjúkrahús?**

Eisini her verður tað ein serføroysk meting av viðurskiftunum. Tey trý sjúkrahúsini (ella fýra sjúkrahúsini um uttanlandaviðgerðin verður tikin við) eiga at fáa sínar seruppgávur, sum gevur grundarlag fyri at tey framyvir virka sum sjúkrahús.

Eitt sjúkrahús stendur fyrst og fremst fyri kanning og viðgerð. Fyri at talan kann verða um eitt sjúkrahús, er sostatt neyðugt við grundleggjandi funktiónum so sum laboratorium, røntgen, fyrisiting, skaðastovu, skurðstovu, seingjardeildum, fysio- ergoterapi servicu- og røktarstarvsfólki o.s.fr. Tær funktiónir sjúkrahúsið hevur, verða so leiddar av serlæknum á økinum.

Tað vil so aftur í grundini siga, at sjúkrahúsinum skal gevast eitt trygt grundarlag at útynna tær funktiónir sum teimum er álagt. Her tosa vit m.a. um neyðugu fysisku karmarnar, játtan, skipan av virksemi og serútbúgvið starvsfólk.

Tað nyttar ikki so nógv at hyggja eftir hvussu okkara grannalond hava skipað seg. Vit kunnu fáa ávís hugskot, men ikki yvirføra modellið í síni heild.

Tað verður aldri tann sama læknaliga tænasta at fáa um tú ert búsetandi í Hattarvík ella Tokyo. Hinvegin kann gerast ein skipan so at bæði hattavíkingurin og tokyobúgvin kenna seg tryggar, og munurin á tænastuni verður, tá alt kemur til stykkis, helst ikki so stórur sum ein kundi væntað.

**Akutt virksemi ella ikki.**

Í okkara kjaki hava vit ofta lyndi til, at hyggja at um tey smáu sjúkrahúsini skulu hava akutt virksemi ella ikki.

Í hesum sambandi eru eitt ørgrynni av argumentum frá fleiri síðum viðvíkjandi tí akutta medisinska, mótvegis tí akutta kirurgiska og aðrar greinar. So kemur støddin og funktiónin av sjúkrahúsinum upp í myndina, flutningstíðir og at enda, upptøkuumráðið.

Sundhedsstyrelsen ræður til at tað í Danmark skulu verða millum 200 – 400.000 fólk í upptøkuumráðinum fyri at hava eitt fult útbygt akuttsjúkrahús.

Soleiðis kann onki sjúkrahús í Føroyum lúka hesi krøv. Í Islandi skuldi bert verið eitt akutt sjúkrahús, men teir hava fleiri. Í Grønlandi skuldi heldur onki verið, men teir hava 16 sjúkrahús við døgnvakt á skaðastovu. So spurningurin er, um tað í heila tikið er gjørligt at brúka hetta modellið.

**Grannalondini leggja virði sum grund fyri virkseminum. Skipa reglur so at politikarar gerast leysi av at reka sjúkrahús.**

Í norðanlondum annars verða heilt onnur grundleggjandi virði løgd til grund, ið tá skoðað verður inn í framtíðina innan heilsuverkið. Hesi grundleggjandi virðini eru millum annað:

- Eins kanning, viðgerð og røkt av øllum borgarum
- Solidarisk fígging
- Grundleggjandi etisk virði í raðfestingini
- Gjøgnumskygni í raðfestingini
- Atskildar uppgávur millum politikk og fakkunnleika
- Atskildar uppgávur millum fígging og útynnara
- Frítt viðgerðarval
- Rætt at stovna privat virki við avtalu við fígjandi mynduleika
- Gjøgnumskygni í viðgerðar virkseminum

Skaða - heilsu- og sjúkuviðgerð skal verða eins fyri allar borgarar. Hetta viðførir at borgarar uttan atlit til bústað og sosialan, búskaparligan ella málsligan skilnað, hava eins rætt til at njóta tað tænastu sum almenna fíggjaða heilsuverkið kann bjóða.

Hetta merkir eisini, at fíggingin av samlaða verkinum sum m.a. umfatar sjúkrahús, kommunulæknar, røktarheim, nærverk og ávísir aðrir stovnar, er miðskipað fyri at tryggja sær eins viðurskifti fyri allar borgarar. Harafturat eigur, har sjúkrahús eru, so nógv sum gjørligt, at verða savnað á einum staði.

**Føroysk sjúkrahús eiga at verða nærsjúkrahús við kanningar/viðgerðar/røktingar/venjingar og heilsuøkjum har sjúklingar kunnu fáa síni sjúku, skaða og heilsuviðurskifti avgreidd.**

Tað er til dømis púra burturvið at hava kommunu-